Ingilín Didriksen Strøm
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um sernámsfrøði, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvørjar orsakir eru til, at sernámsfrøði ikki verður ein vallærugrein á námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya næsta skúlaár?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rætt at niðurraðfesta lærugreinar, sum styrkja førleikarnar hjá námsfrøðingum og lærarum at lofta børnum við sálarligum avbjóðingum, tá vit vita, hvussu gongdin er á hesum økinum?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta onnur átøk í verk, sum styrkja um førleikarnar hjá námsfrøðingum og lærarum til at lofta børnum og ungum við sálarligum avbjóðingum?

Viðmerkingar
Seinasta árið hevur nógv verið tosað um keðiligu gongdina hjá børnum og ungum við sálarligum avbjóðingum, bæði í Løgtinginum, í miðlunum og úti í samfelagnum. Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um at seta í verk ókeypis sálarhjálp til børn og ung varð samtykt, og landsstýrismaðurin arbeiðir við at fáa hesa royndarskipanina í verk. Og í vikuni hava vit viðgjørt uppskot frá Jóhannisi Joensen, tingmanni, um at seta í verk skipan við økissálarfrøðingum, eisini við sama endamáli – at styrkja um sálarheilsuna hjá børnum og ungum.

Skulu vit venda keðiligu gongdini, er tað umráðandi, at allir partar samstarva og eru varugir við vandatekin o.a. Her verður hugsað um øll yrkisfólk, sum eru um børnini og tey ungu, bæði heilsufrøðingar, námsfrøðingar, lærarar o.o. Tí undrar tað nú mong, at Fróðskaparsetur Føroya, sum útbýr bæði námsfrøðingar og lærarar, hevur valt at niðurraðfesta vallærugreinina, sum styrkir førleikarnar hjá teimum lesandi til at lofta børnum og ungum við sálarligum avbjóðingum. Sernámsfrøði er ein sera væl umtókt lærugrein, so orsøkin er ikki vantandi undirtøka.

Fyri at fáa greiðu á, hví sernámsfrøði ikki verður lærugrein komandi skúlaár, og hvat landsstýrismaðurin ætlar at gera til tess at styrkja um førleikarnar hjá námsfrøðingum og lærarum til at lofta børnum og ungum við sálarligum avbjóðingum, verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 26. februar 2021

Ingilín Didriksen Strøm